## DAGSINS MEINING

# 13% í skatti?

Vit høvdu eina sera áhugaverda samrøðu her í blaðnum, har tveir ungir føroyskir vinnulívsmenn, ið hava sera góð avrik at vísa á uttanlands, viðmerkja ætlan løgmans, um at Føroyar skal gerast heimsins fremsta land í 2015.

Hesir menn siga heilt einfalt, at umfatandi virksemið, ið teir hava í dag við nógvum arbeiðsplássum uttanlands, ikki hevði kunnað verið flutt til Føroyar, m.a. tí at føroyingar ikki hava tær skattaavtalur, ið krevjast. Hetta mátti fingið politikarar at hugsa eitt sindur um hetta, hóast teimum ikki nýtist at taka undir við øllum.

Vit hava, við at kopiera danska lógávu uttan tilhoyrandi dupultskattasáttmálar, málað okkum upp í ein krók, har so at siga einki handilsvirksemi kann rekast effektivt úr Føroyum uttan til Danmark ella norðurlond. Nær hevur man politiskt bestemmað, at vinnan skal hava so avmarkaðar treytir at virka undir? Hevur man nakrantíð bestemmað hetta politiskt?

Eitt eru sáttmálar og handilsavtalur, sum eiga at fáa hægsta prioritet, um vit skulu verða komin nakran veg í 2015. Ungu vinnulívsmenninir ráddu eisini til eitt skattaprosent uppá 13% í Føroyum og eina minking av tí almenna sektorinum.

Fyriuttan tað, at sama skattaprosent fyri øll vildi verið í stríð við tað samhaldsfasta prinsippið, har tey ið megna minst og øvugt, so er eisini ivasamt, um allar vælferðartænastur kundu verið betaltar við einum slíkum prosenti.

Tá tað er sagt, so eiga vit at diskutera hetta mál og ikki blankt at avvísa, at almenni sektorurin kann minka, so tað kann gerast bíligari at liva i Føroyum.

Tað er umráðandi, at man skilir ímillum tann partin av tí almenna, ið beinleiðis veitir eina vælferðartænastu t.v.s tann partin íð leverar eitt útbúgvingarverk, eina sjúkrarøkt, eldrarøkt o.s.fr., og so restina. Tað er eingin ivi um, at eina ávísa umsiting mugu vit hava við innkrevjingarfunktiónum og kontrolfunktiónum, men nú er tíð at endurskoða nógv av hesum, ikki minst tí, at stýringsamboðini eru nógv betur í dag, enn fyri bert fáum árum síðani.

Hvat er innkrevjingarkostnaðurin pr krónu, ið verður kravd inn av tí almenna íroknað kontrolfunktiónir? Kundi hetta tal ikki verið minkað? Kundu vit ikki foreinklað MVG skipanina? Vit høvdu fyrr í ár eitt uppskot á hesum stað við at útskríva eina kapping til eina nýggja MVG skipan, har vinnarin var tann, ið kundi gera ta skipanina, ið var bíligast at umsita. Hvi ger man ikki hetta? Hvussu nógv fólk sita í reinum kontrolfunktiónum í tí almenna í dag? Hvussu nógv tilfeingi verður í dag kanaliserað burtur frá borgaratænastunum til internt brævaskifti og dupultfunktiónir, ið kanska í summum førum leggja minni virði afturat, enn hesin aktivitetur kostar?

Núverandi gongd kann ikki halda fram. Blokkniðurskurðurin hevur gjørt tað neyðugt at spara eina millión um dagin á útreiðslusíðuni hjá tí almenna, um man vil tað ella ei. Hóast man neyvan kemur niður á 13% í skatti, um vælferðarsamfelagið skal varðveitast, so hevur skattgjaldarin í hvussu so er uppiborið eina endurskoðan og rationalisering av almennum virksemi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Mjørkatúrurin 17 juli 2005

**Majbritt Jacobsen**

10 juli. gleddi 12 ára gamla dóttir mín seg til at fara til Danmarkar at ferðast. Aftaná nakrar deiligar dagar, gleddi hon seg tó at koma heimaftur til klettarnar. Tað var tann 17. juli. Mjørkadagarnar.

Tað var ikki stuttligt. Vit fingu at vita, at flogfarið var avlýst og so vóru góð ráð dýr. Dóttir okkara dámar ikki at vera einsamøll millum fremmand, slettis ikki at sova saman við teimum. Hon kundi ikki vera hjá familjuni niðri, um hon nú kom ov seint til flogfarið. Eingi visti nær fari var avstað og hvussu langa tíð, tey høvdu at umráða seg.

Systurdóttur mín slapp at sova saman við dóttur míni á hotellinum. Aftaná at hon (systurdótturin) mátti fara tíðliga á morgni, tóku tey sær væl av henni, bæði tey á hotellinum og ferðaleiðarin, sum var send av flogvøllinum. Ferðafylgið var síðani kunnað um støðuna og vóru síðani bjóðað at fara ein túr í Legoland. Her var tó tann trupulleiki, at tey ikki kundu senda dóttur mína avstað einsamalla. So tá ein ótrúliga fitt familja, sum vit ikki kendu, bjóðaði sær at taka hana við í Legoland ringdu tey til mín fyri at kanna um hetta var í lagi.

Ein fyrikomandi maður, presenteraði seg og segði sum var og um vit vildu geva loyvi til at hon, fór við familjuni avstað. Sjálvandi slapp eg fyrst at tosa við viðkomandi, hetta játtaði eg so.

Í Legolandi fingu tey "matpengar" bæði til døgurða og náttura. Tey fingu javnan kunning um nær tey kundu vanta at fara.

Eg var sjálvandi eitt sindur órólig og forvitin fyri at vita, nær tey komu so eg ringdi nakrar ferð til Atlantic og fekk altíð fitt og fyrikomandi fólk í hornið. Tey tóku sær góða tíð at lurta eftir, hvat tað snúði seg um og um tey ikki kundi svara mær her og nú, ringdu tey aftur til mín og góðu mær boð.

Sjálvandi ynsktu vit at verið hesa hending fyriuttan, men eg haldi at starvsfólkið í Atlantic hevur alt rós uppiborðið. Eg havi bara gott at bera Atlantic Airways.



**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.